# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Til Petrinu Hansen á 80 ára degnum



Góða omma og langomma, hetta er bert ein lítil heilsan til tín á tínum 80 ára degi. Takk fyri at tú altíð ert so góð við okkum.

Gestablíð ert tú altíð. Tað er mangan komið fyri at heil hondbóltslið og kapp-róðrarfólk hava verið og etið døgurða, drukki drekkamunn ella ligið nátt í tínum heimi. Takk fyri at vit altíð eru vælkomin í títt heim.

Vit hava nógv góð minnir frá barnaárum í Klaksvík. Tað vóru ikki nógvar feriur, sum fóru framvið, uttan at vit vóru hjá tykkum. Túrarnir norður eftir oyggj við bili ella bussi og síðani við báti, sita fastir í minninum. Vit vita, at tú altíð situr og bíðar, klár við døgurða ella náttúrða, tá ið tú veit at vit koma.

Hetta fer alt at broytast nú undir-sjóartunnilin kemur, og tá fara vit at koma óvæntað og vónandi oftari á vitjan.

Sand- og mar-morkøkur er tað eingin, sum dugur betri at baka enn tú, og smákøk-urnar eta vit sum bomm.

Til hondabreiði dugur tú sera væl. Allar tær mongu troyggjur, hosur, ullint undirklæðir og mangt annað, sum tú hevur bundið uppá okkum, ja vit høvdu nokk mangan gingið køld, um tú ikki bant.

Eingin eigur eina so fitta ommu og langommu sum vit. Aldurin ber tú sera væl. Góða elskaða omma og langomma. Hjartaliga til-lukku við 80 ára degnum tann 12. oktober og mong góð ár í framtíðini, má Jesus pápi fylgja tær.

**Ynskja Hanna, Jacklin og Bjarni við familjum**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu , tá okkara góða mamma, omma og langomma

**Marianna Hjalt**
(Manna)
Sandi

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum á Gerðisgarði fyri hjálp og umsorgan.
Tøkk til prest, gravarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum.
Takk fyri blómur og heilsanir
Tøkk til tykkum sum hava latið peningávu
til Sands kirkju.

*Vegna tey avvarðandi*

**Betty, Randi, Steen, Jonas, Rasmus, Rúni, Lea og Josephine**





Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Ført tú ikki tikið teg saman?**
Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin
"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo


†

## Andlát og jarðarferðir

**Elsebeth Arge** av Argjum, vanliga nevnd Ebba, andaðist mánadagin, 94 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju hósdagin klokkan 13.

**Jógvan Julius Joensen,** ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Gilleleje, andaðist sunnudagin, 95 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13 úr kirkjuni Bygade 26, Søborg, 3250 Gilleleje.

**Rita Günther** fer til gravar úr Marstal kirkju á Ærø mikudagin 12. oktober klokkan 12.

Tey, ið vilja minnast Ritu kunnu lata Zarepta eina gávu. Konto í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu tá okkara høgt elskaða mamma, vermamma og systir og okkara allarbesta omma og langomma

**Charlotta Christiansen**
Porkeri

doyði og varð jarðað.

Takk fyri blómur og kransar og peningagávur
til Missiónshúsið.
Takk øll tit, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.
Takk fyri góða hjálp til ervið, takk til heimahjálpirnar og heimasjúkrasystrarnar, sum vóru so góðar við hana.
Takk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Sverri, Kristina, Kári og Eyðbjørg**

### 60 ár

Hósdagin 13. oktober fyllir Hildebjartur Antoniussen 60 ár. Vælkomin inn á gólvið tann 14. oktober.

### 75 ár

Leygardagin 15. oktober fyllir Páll Jacobsen, á Nesi, Vágur 75 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá hann, eru vælkomin millum kl. 10.00 og 14.00.

### Dagurin

**12. oktober. Maximilianus,** deyður umleið ár 285. Pávin Sixtus II sendi hann sum trúboðara til tað, sum nú verður rópt Eysturríki. Hann varð seinni biskupur, men bleiv tikin av døgum. Er verndarhalgimenni hjá Eysturríki, og fleiri av keisarunum har hava borið navnið Maximilian.

Navnið merkir ***hin fjølmenti.***

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## *Almenn móttøka*

Í sambandi við at Tryggvi Johansen leggur frá sær og Herálvur Joensen tekur við starvinum sum nýggjur sendimaður, verður boðið til móttøku á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn **hósdagin 13. oktober 2005 frá kl. 16.30** har løgmaður Jóannes Eidesgaard er vertur.

*Øll eru vælkomin.*